# AME verpur smærri tiltøk



**Tvær smáar konsertir eru komnar afturat høvuðstiltøkunum í Norðurlandahúsinum, hóskvøldið og fríggjakvøldið verða AME kvøld í Kagganum.**

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Konsertirnar í Kagganum verða fyriskipaðar í sambandi við AME-Føroyar tiltakið í Norðurlandahúsinum, og gestir við AME-armbandi gjalda hálvan prís fyri at sleppa inn í Kaggan hesi kvøldini. Her verður talan um sera spennandi konsertir, við nøkrum av okkara fremstu nøvnum. Millum nøvnini verða Boys In A Band, ið varð kosin besti nýggi bólkur á Planet Awards, Rókur, ið vann heiðurin besti sangari á Planet Awards, Guðrið Hansen, ið var í uppskotið til heiðurin besta songkvinna, Budam, ið var í uppskoti til heiðurin besti nýggi bólkur umframt GBOB vinnarin Deja Vu.

Konsertin hóskvøldið byrjar kl 21:00 og kostar 100,-. Á skránni verða Guðrið Hansen, Stanley Samuelsen, Deja Vu og Budam.

Fríggjakvøldið byrjar konsertin í Kagganum uml kl 00:30, hetta er tá AME-tiltakið í Norðurlandahúsinum er endað. Kostnaður 120,-. Á skránni verða Crawling Blue, Boys In A Band, Die Dummen Dänen, Kristleif og Rókur.

Atgong umerkir til AME-tiltakið í Norðurlandahúsinum kunnu keypast í Norðurlandahúsinum og við dyrnar í Kagganum í samband við konsertirnar har.

## SKRÁIN FYRI AME TILTAKIÐ

| FRÍGGJKVØLD KLOKKAN 19.30 | LEYGARKVØLD KLOKKAN 19.30 |
|---|---|
| Jonas Molinder | Lena Anderssen |
| Gestir | AMPOP |
| Angu | DEJAVU |
| Marius | Høgni Lisberg |
| Ave | Eivør |
| 200 | Grand Island |
| SIC | Die Dumme Dænen |

**BEST ER AT KOMA GÓÐARI TÍÐ, OG FÁA AME-ARMBANDIÐ Á ARMIN. NORÐURLANDAHÚSIÐ ER OPIÐ ALLAN DAGIN**

# Egil tryggjar ljós í heimsflokki

**Norðurlandahúsið hevur tryggjað sær, at ljósviðurskiftini á AME-Føroyar komandi vikuskifti verða í heimsflokki.**

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Besti føroyski ljósmaðurin Egil B. Hansen er settur á uppgávuna.

Tað er longu frammanundan greitt, at tónleikurin á Atlantic Music Event verður í heimsflokki, tá Jonas Molinder, Angu, Sic, 200, AVE, Gestir, Marius, Ampop, Eivør, Deja Vu, Høgni Lisberg, Grand Island, Lena Anderssen og Die Dummen Dänen fara á pall komandi vikuskiftið. Men nú kunnu vit avdúka, at konsertirnar eisini fara at síggja út í heimsflokki.

Føroya fremsti ljóssnillingur Egil B. Hansen kemur heim úr Danmark, har hann búleikast og starvast, sum ljóstøkningur.

Egil hevur fleiri gjørt tað flotta ljósið, sum hevur verið til t.d. Prix Føroyar finalurnar og hópin av øðrum stórum tiltøkum í Føroyum. Vit eru sera spent, hvat Egil fer at finna uppá!. Ljósið hjá Egil er altíð ein listarlig uppliving í sær sjálvum, siga fyrireikararnir á ame.fo.

Hetta sparkar revv

CASIO



- 6 mill. Pixels
- 3 x zoom
- Metallhúsi
- 2" TFT skýggi
- USB Direct Print
- Taska, ladari og 512 Mb kort

CASIO EXILIM EX-Z110

SPAR 1.000,-
FYRR 2.995,-
1.995,-

expert - vit vita

SMS 35 35 35
Tilboðið er galdandi so leingi vøran er á goymslu



BIG KING XXL
Stórt, skjótt og gott...
BURGER KING